## Økslin á Fogh úr lið

Tá Anders Fogh Rasmussen kom til Istanbul í Turkalandi seint í gjárkvøldið, var hann so óheppin at detta inni á hotellkamarinum, og fallið var so meint, at onnur økslin fór úr lið. Teir donsku lívverjarnir hjálptu fyrrverandi forsætisráðharranum, sum síðani bleiv koyrdur á Taksim Emergency-sjúkrahúsið. Har bleiv hann doyvdur í eitt korter, meðan læknarnir settu økslina upp á pláss, og klokkan sjey í morgun kom hann aftur á hotellið hond í fatli. Anders Fogh Rasmussen er í Istanbul til eina stóra ráðstevnu.



## Andstøðan hevði vunnið

Nýggi forsætisráðharrin í Danmark, Lars Løkke Rasmussen, byrjar í mótbrekku. Ein kanning hjá Rambøll vísir, at var fólkatingsval nú, hevði andstøðan vunnið. Hon hevði fingið 91 tinglimir, meðan stjórnarsamgongan hevði fingið 84. Heru eru teir føroysku og grønlendsku tinglimirnir sjálvandi ikki við. Kanningin, sum varð gjørd tann 4. apríl, gevur Sosialdemokratunum, Sosialistiska Fólkaflokkinum, Teimum Radikalu og Eindarlistanum 52,2 prosent av atkvøðunum. Vinstri, Tey Konservativu og Danski Fólkaflokkurin høvdu fingið 47,8 prosent.

# Lars elskar at ferðast í Føroyum

**Tá Sólrun og Lars vóru nýforlovað, tímdi hann onki serligt at ferðast heim til Føroyar við føroysku unnustuni. Men nógvu seinastu árini hevur hann elskað at ferðast í Føroyum, her hann eisini hevur fleiri vinfólk**

FÓLKALÍV
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Sólrun Jákupsdóttir Rasmussen. 40 ár, lærari og mamma Berg, Lisu og Símum. "Heilur" føroyingur og forsætissætisráðharrafrúa.

Tað er ikki eiti á sum føroyingar gera um seg í sunnasta parti av kongaríkinum í hesum døgum. Ikki bara innan sang, tónleik og dans, men mínsann eisini á toppinum í donskum politikki, har sjálvur forsætisráðharrin hevur føroyska konu.

Sólrún Jákupsdóttir Rasmussen er dóttir Bergljót av Skarði, studentaskúlalærara í Havn, og Jákup Petersen, yvirlækna úr Klaksvík.

Sum so nógvir aðrir føroyskir ungdómar leitaði Sólrun sær til Danmarkar at lesa, tá hon var 18 ára gomul. Eisini føroyingum líkt, fluttin hon inn á eitt kollegium á Amager, og árið eftir hitti hon unga VU'aran, Lars Løkke Rasmussen. Hon var tá 19 ár og hann 23 ár.

– Eg hevði eina vinkonu, sum var virkin í ungmannafelagnum hjá Venstre, VU. Hon hevði ofta vitjan av øðrum ungum frá flokkinum, og tað var í hesum samandi, at eg lærdi Lars at kenna. Hetta hevur verið umleið 1988, sigur Sólrún við Sosialin.

Enn var Sólrun tó ikki sjálv virkin í politikki, men hon fylgdist við teimum ungu í Venstre. Seinni gjørdist hon tó limur í flokkinum, sum hon eisini hevur umboðað í býráðnum í heimkommununi Græsted frá 1997 og níggju ár fram.

- Tað, sum eg fall fyri við Lars var, at hann hvíldi so væl í sær sjálvum. Hann var klókur, sjarmerandi og búgvin, og hevði ikki brúk fyri at gera seg upp ella at blíva 'bekreftaður' alla tíðina. Eisini var hann sera virkin, hevði nógv hugskot og tók stig til alt møguligt, sigur Sólrun, sum giftist við Lars Løkke Rasmussen í 1998.



*Danski forsetisráðharrin roynir seg sum gartnari fyri vermóðurina í Havn*
*Mynd: Privat mynd*



*Ein góðveðursdag í Mjørkadali. Vit síggja Lars, Símun, Lisu Løkke Rasmussen*
*Mynd: Privat mynd*

### Skal sannføra fólk

Spurd, hvussu hon roknar við, at maðurin fer at megna uppgávuna sum forsætisráðharri, sigur Sólrun, at hon, og øll onnur, sum kenna hann, ivast ikki í, at hann fer at hepnast væl.

- Hansara stóra avbjóðing verður at prógva fyri øllum øðrum, at hann er skikkaður til starvið. Hetta kann hann bara gera við at arbeiða hart og at mótprógva øllum søgunum um, at hann bara er ein lívsnjótari, sigur Sólrun.

Og so vísir hon sjálvandi eisini á ítøkiligu politisku avbjóðingarnar, sum liggja fyri framman, eitt nú fíggjarkreppuna og bíðiligstarnir til sjúkrahúsini.

- Tað eru fleiri, sum royna at sáa iva um Lars. Helle Thorning frá Sosialdemokratunum rópar hann ein ideologiskan ryttara, onnur óttast, at hann fer at koyra beinharðan og kaldan vinstrapolitikk, og uppaftur onnur vilja vera við, at honum dámar ov væl at drekka øl og at liva tað stuttliga lívið, sigur Sólrun.

Tí veit hon eisini, at hann noyðist at arbeiða hart fyri at blíva virdur sum ein seriøst arbeiðandi maður, sum fer tíðliga til arbeiðis og